**Røktar- og umlættingarheimið**

Lágargarður

# søkir summar-frítíðaravloysarar

í røkt, køk, reingerð og vaskarí í tíðini frá 1. juni til 31. august 2005 ella sambært nærri avtalu.

**Fyri røktarstarvsfólk:**
Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktar/sjúkrahjálpara.

**Somuleiðis verður søkt eftir avloysarum fyri starvsfólki í køkinum:**
Økonoma ella køksassistentar, umframt hjálparfólk til at avloysa tey, ið koyra døgurða út til heimabúgvandi pensionistar, tískil er koyrikort neyðugt.

Avloysarar fyri starvsfólki í vaskarí og reingerð fáa neyðuga vegleiðing í nýtslu av tólum og amboðum og mannagongdini annars.

Frítíðaravloysararnir eru tímaløntir, og lønin er sambært avtalu ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrksifelag.

Umsóknarfreistin er 14. mars 2005.

Skrivliga umsóknir við neyðugum prógvum skulu sendast til leiðaran á

**Lágargarði**
Stoffalág 84
Box 1188
110 Tórshavn

# Frá Havnar handverkarafelag/eftirlønargrunninum

Ársaðalfundurin verður mikudagin 16. mars 2005 kl. 19.30 á Hotel Hafnia.

Skrá samb. § 25 í lógini:
**1.** Val av orðstýrara
**2.** Frágreiðing frá farna árinum
**3.** Roknskapur til góðkenningar
**4.** Innkomin mál/lógarbroytingar (Lívstrygging/-limagjald)
**5.** Val av nevnd
**6.** Val av tveimum grannskoðarum
**7.** Ymiskt

Aftaná aðalfundin verður aðalfundur í Eftirlønargrunninum við hesi skrá:
**A** Val av orðstýrara
**B** Frágreiðing frá nevndini um virki grunnsins í farna ári
**C** Framløga og góðkenning av roknskapi og fíggjarstøðu
**D** Støða verður tikin til, hvat gerast skal við møguligt avlop ella hall
**E** Val av nevndarlimum
**F** Val av grannskoðara
**G** Møgulig mál frá nevnd/limum

**Havnar Handverkarafelag**

# Heimarøktin

## Vágoy/Norðstreymoy

Lýsir eftir summarferiuavloysarum í tíðarskeiðnum 01. juni til 31.august 2005

**Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum at arbeiða í økjunum:**
• Vestmanna / Kollafjørð
• Sundalagið / Eiði
• Vágoy

**Vit søkja eisini eftir heilsuhjálparum at arbeiða úti í Heimarøktini í økjunum:**
• Vágoy - allar bygdir
• Vestmanna / Kvívík / Kollafjørður
• Sundalagið / Eiði

**Somuleiðis verður søkt eftir heilsuhjálparum og heilsurøktarum at arbeiða inni á hesum Eldrasambýlum:**
• Korndalsbýlið á Eiði
• Eldrasambýlið í Vestmanna
• Eldrasambýlið í Kollafirði

**Vit kunnu bjóða:**
• Eitt spennandi og mennandi starv har arbeitt verður tvørfakligt
• Eitt starv við nógvum avbjóðingum
• Eitt starv í einum øki sum er í støðugari menning

Meira fæst at vita um størvini við at ringja til økisskrivstovuna á tlf. 333249.
Størvini vera sett sambært sáttmála millum fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum v.m. verður at senda til:

**Heimarøktin Vágar / Norðstreymoy**
Økisskrivstovan
370 Miðvágur

Umsóknarfreist: 31.03.05

Havnar
SJÚKRAKASSI

# Umboðsráðsval

## verður hósdagin 3. mars 2005 frá kl.9.00 til kl. 18.00

Hesi valevnir eru uppstillaði til umboðsráðið hósdagin 3. mars 2005.

Teir persónar sum eru merktir við " *) " eru umboðsráðslimir, sum hava sitið farna skeiðið.

**Tórshavnar valdømi:**
Birgit Hansen, Heygsvegur 1, Tórshavn *)
Jenny Hansen, Dalakrókur 19, Tórshavn
Juliette Hansen, Varðabyrgi 34, Tórshavn
Ingrid S. Henriksen, Gundadalsvegur 53, Tórshavn *)
Heðin Mortensen, Hoyvíksvegur 22A, Tórshavn *)
Karin Maria Nielsen, Brattabrekka 27, Tórshavn *)

**Nólsoyar valdømi:**
Suni Hansen Nólsoy *)
Torbjørg Jacobsen,Nólsoy

**Havnar Sjúkrakassi**

JAVNI

# Javni bjóðar til almennar fundir

**Kring landið undir heitinum**

Tú kanst - bara tú fæst møguleikan

**Fundirnir havatil endamáls at:**
• Lýsa møguleikarnar hjá fólki viðmenningartarni
• Lýsa møguleikarnar hjá avvarðandi at børnum og ungum við menningartarni
• Lýsa hvørjar møguleikar fólk við breki ynskja stóðu teimum í boði
• Læra okkum at síggja nýggjar møguleikar og at brúka teir

**Evni, sum eisini verða umrøtt er:**
Er tann við menningartarni ein kleppur ella ein kraftkelda

Fundirnir verða skipaðir við fyrilestri, kjaki og spurningum, og ein drekkamuður verður eisini at fáa.

**Fundirnir verða:**
2. mars kl. 19.00 - í Húsmøðrafelagnshúsinum í Sørvági
3. mars kl. 19.30 - Í Studentaskúlanum á á Kambsdali
5. mars kl. 14.30 - Á Hotel Bakka í Vági
7. mars kl. 19.30 - Á Hotel Hafnia í Tórshavn
15. mars kl. 19.00 - Á Bókasavninum í klaksvík

Øll eru hjartaliga vælkomin.

*Serliga vóna vit, at tey, ið kunnu viðvirka til at geva møguleikarnar, koma við á fundirnar. Her hugsa vit um framhaldsskúlanæmingar, lærarar, pedagogar, stuðlar, øll innan heilsaverkið, og so sjálvandi eisini politikkararnar.*

**Vegna økisnevndirnar í Javna**
Malena Arnholdsdóttir

# Vaskifólk

**Til gomlu læknahúsini hjá Runavíkar kommunu**

Søkt verður eftir vaskifólki til Frítíðarskúlan/Dagrøktina í Runavíkar Kommunu, at byrja skjótast gjørligt ella eftir avtalu. Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna.

Starvssetan sambært sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast á tlf. 448594 lok. 10.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi seinast mánadagin 07.03.05 og senast til:

**Barnalonina**
Heiðavegur 22,
600 Saltangará